# Í 75 ára føðingardegi hjá Sosialinum



*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarflokksins prátar við Atla Hansen. Jóannes segði í røðuni, at Sosialurin var farin so langt í óhefta politiska tíðindaflutninginum, at tað kom fyri hjá Javnaðarflokkinum, at tað var ein vansi at eiga blaðið.*



*Nýtt ættarlið. Dóttir Eirik Lindenskov blaðstjóra og mamman Ingun.*




*Ein risatekning av Tobba, evnað til av teknisnillinginum Óla P., meðan Tórbjørn seldi bløð sum landstýrismaður, setti ein festligan dám á móttøkuna. Maðurin á myndini er Frank, bróður Jan Müllers, ábyrgdarblaðstjóra.*

MÓTTØKA

*Orð: Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Ein rúgva av fólki nýtti høvið at vitja á Sosialinum fríggjadagin seinnapart, tá móttøka var í samband við, at Sosialurin fylti 75 ár hendan dagin. Vit vistu slett ikki, at vit vóru so populer. Umboð fyri alt samfelagið kom á gátt við blómum, gávum og góðorðum. Seinni um kvøldið var veitsla fyri innbodnum í HB-húsinum og har vóru tey fyrstu 75 árini hjá Sosialinum feiðrað eitt og eitt fram til tann ljósa morgun og meira enn tað.**

**Her eru nakrar myndir frá móttøkuni, soleiðis sum okkara myndamaður, kvívíkingurin Jens Kristian Vang upplivdi løtuna fríggjadagin**



*Jan tekur her í móti leiðsluni í Føroya Banka. Hondin svav eftir móttøkuna, so nógv vitjaðu.*



*Astrup bankastjóri prátar við Hendrik Old.*



*Okkara fryntligu medarbeiðarar á lýsingardeildini Anja Weihe og Finnbjørg Nattestad*



*Elin Lindenskov og Leivur Hansen hyggja í seinastu útgávuna av Sosialinum, sum kom heit úr pressuni meðan móttøkan varð hildin.*



*Høvdingar hittast.*



*Marknaðarleiðarin á Sosialinum Jonhard við fittu dóttrini Sonju.*



*The Grand Old Lady á Sosialinum, Ann Christiansen saman við maskottinum Ingrid Bjarnastein.*



*Fyrrverandi danski forsætisráðharrin Anker Jørgensen í djúpari samrøðu við Mr. Big, Hans Birgir Hansen.*



*Frá vinstru er kappingarneytin Dimma her umboðað av Leif Láadal, journalisti.*



*Jóhan Samuelsen hugnar sær. Ein trúgvur vinir blaðsins.*



*Kammeratarnir Jona Hendriksen og Anker Jørgensen.*